## VIÐMERKINGAR

# Skal Føroya Landsstýrið lata 300 mio í stuðli til »Wonderland« ætlanina?

BJØRN Á HEYGUM



**Byggiætlanin**
Tey flestu blíva ikki sørt ørkymlað, tá tey síggja nýggju kollveltandi verkætlanina uppi við Stórutjørn, klakt í høvdinum á hesum nýggja matadorinum og fíggjarflogvitinum, Jákupi á Dul Jacobsen.

Mong er sjónarmiðini um hesa verkætlan. Onkur sigur genial, kreativ og full av framtíðarvisiónum.

Onnur finnast at sjálvari byggiætlanini og siga, at hetta er betongslum, sum ikki hóskar inn í føroyska bústaðarmynstrið og heimliga umhvørvi.

Hetta kjak millum viðhalds- og mótstøðufólk av ætlanini skal ikki vera umrøðuevni í hesi grein.

**Søla av 300.000 m²**
Tað sum mest av øllum undrar er, at onkur ikki hevur tikið spurningin um sølu av heilum 300.000 fermetrunum av virðismiklari almennari ogn í høvuðsstaðnum upp til politiska viðgerð.

Politiska skipanin hevur eftir øllum at døma valt at blunda og tiga um henda spurning, meðan verkætlanin sjálv verður hálovað og róst upp um skíggja av bæði býráðs- og løgtingslimum.

Sum tað skilst á Heðin Mortensen, borgarstjóra, so er ætlanin uttan víðari at selja 300.000 fermetrar av bestu og mest høgliga liggandi jørð í landinum til byggilendi fyri ein láturligan og mest sum symbolskan prís upp á kr. 54,00 pr. fermeturin. Hetta gevur eina samlaða inntøku til Føroya Landsstýri og Føroya fólk upp á kr. 16.200.000,00. Góðar sekstanmilliónir tað er alt! Samstundis vita vit, at lendi til bygging í Tórshavnar Kommunu í dagsprísum fer væl upp um kr. 1.000 pr. m². T. d. hevur Tórshavnar Kommua sjálv júst selt eina trøð upp á umleið 11.000 fermetrar við Velbastaðvegin fyri góðar 11 mio kr. Skuldi jørðin í Hoyvíkshaganum verið seld fyri sama virði og ikki eitt kunstiga lágt virði, ja so gav hon 300 mio kr í landskassan ella svarandi til t. d alt hallið á fíggjarlógini.

**Undirprísur?**
Kann tað almenna veruliga loyva, at jørðin á henda hátt verður givin burtur til ávísar útvaldar persónar, sum seinni kunnu heysta profittin av tí meirvirði, sum jørðin hevur longu í samband við søluna, kundi hóskandi verið spurt. Nei, vit kunnu heilt einfalt ikki forsvara ein slíkan handil (forering) mótvegis hart kroysta skattaborgaranum, sum jú eisini skal fíggja tann miss, sum tað almenna her kann staðfesta uppá 300 mio kr. – 16 mio kr. ella **284 mio kr.** Onga aðrastaðni er at fara eftir pengnum!

Hetta kann jú samanberast við, at ein bygningur hjá tí almenna knappliga var seldur fyri ca. 5% av veruliga virðinum til onkran tilvildarligan persón, uttan at bygningurin var bjóðaður út til fría sølu.

Tað hevði nokk verið eitt ramaskríggj millum fólk og politikarar, um t.d. Albert Hall var selt fyri t. d. 2 mio kr. ella 5% av virðinum, um vit t.d. seta hetta til 40 mio kr. Hetta hevði ogin funnið seg í.

Men hvat er munurin – hann er ongin! Og um tað er Albert Hall, ferðamannaskipið Smyril ella jørð í Hoyvíkshaganum, sum ikki verður útboðin og seld fyri undirprís, er eitt og tað sama!

**Útboð av almennari jørð!**
Tað almenna kann heilt einfalt ikki loyva sær, at geva borgarans ogn burtur, tá hetta er partur av hansara virðum og rættindum, sum tað almenna hevur eina treytaleysa skyldu til at røkja bæði skynsaman og forsvarligan hátt.

Støðan er tann, at almenna jørðin, serstakliga runt um høvuðsstaðin, blívur bara meira og meira verd fyri hvønn dag sum gongur.

Tískil má tað almenna nú leggja á fullkomuliga annan bógv í samband við sølu av almennari jørð.

Jørðin eigur sostatt í útgangsstøðinum at bjóðast út, eins og almennu fyritøkurnar, sum nú skulu privatiserast. Skattaborgarin hevur væl saktans sama krav at mest burtu úr, tá tað snýr seg um jørð sum tá tað snýr seg um almenn partabrøv – ella hvar er munurin? Hann er í hvussu er ringur at fáa eyga á!

Peningurin fyri festijørðina eigur at fara beinleiðis í landskassan. Gamla mynstrið við festikonti, er tíðin langt síðan farin frá. Bóndin má fáa endurgjald fyri mistar inntøkumøguleikar á annan hátt, tá søluprísurin fyri jørðini í slíkum førum als ikki stendur mát við landbúnaðarligu skerjingarnar og og staðfesta inntøkumissin.

**Almenni sølupolitikkurin endurskoðast ?**
Vónandi fatar politska skipanin álvarsemi í hesum máli, soleiðis at Búnaðarstovan kann endurskoða sín antikvariska sølupolitikk. Endamálið má vera at fyribyrgja, at almenn virði fyri 100 tals milliónur fyrilitarleyst verður givin burtur. Tað hava vit heilt einfalt ikki ráð til. Farast má burtur frá følskum og kunstigum lágum prísum tilvildarliga ásettir av umsitingini uttan atlit til veruleikan.

Hetta er eisini fullkomuliga órímuligt og botnórættvíst mótvegis øllum teimum borgarum her í landinum, sum av tilvild ikki standa til at fáa festijørð til keyps. Hví skulu nøkur vera noydd til at rinda vanligan prís fyri at ognast jørð til byggilendi, meðan onnur fáa hetta mest sum fyri onki. Tað kann ikki vera rætt!

# Várt land er alfagurt



VIGGO OLSEN

*Haldi leiðina niðan á Reynini*
*er grýtut eins og mánalendi*
*fara vit gjøgnum brekkuna stóru*
*er tað eins og 23 sálmur hjá Dávid.*

*Við angandi grasgrønum fløtum*
*og hvíldaráum góðum*
*veri boðin vælkomin av hjarmandi seyði*
*og ljómandi fuglasongi.*

*Hyggi suður í hav, Skálhøvdi*
*og tann forna bygd Skálavík*
*vársól bjørt á fjallalíðum*
*alt í kvirru andar.*

*Havskin sum skyggjandi silvur*
*skynið kínir aldubrot inni á møl.*
*Ja, eg elski mítt land*
*sum tað stígur fram.*

# Ræðandi tilvild

HERGEIR NIELSEN
Løgtingsmaður



Synd er at siga, at landsins leiðsla hevur stórvegis takføri á viðurskiftum okkara.

Stuttskygdar loysnir tróta ikki, og latenti ørskapurin í landsins fíggjarviðurskiftum stendur bara við og versnar.

Rúgvan av stórmálum, sum sakna eitt politiskt handalag bara veksur og veksur.

Beinleiðis láturlig og stak óbúgvin eru tunnilsmálini.

Leirvíkstunnilin varð syftur útaftur av tingi um dagarnar, og Hovstunnilin fekk somu lagnu, tá hann skuldi leggjast í alment partafelag.

Har var so lítið fantilsi á, at landstýrismaðurin tók málið aftur, aftan á at vit undir viðgerðini á tinig høvdu greitt honum frá ørskapinum.

Men stórstu og mest álvarsomu stórmálini verða nú umrødd í frágreiðing frá Landsgrannskoðanini, sum jú er óheft politiskt, men sera atfinnginarsom.

Í oktober kom ein frágreiðing um munin millum játtan og nýtslu fyri 2004.

Har vóru fleiri lemjandi atfinningar móti landsins leiðslu, men so eiðasørt tað rein við nakrastaðni.

Tað er ein farin tíð, at landsstýrismenn skulu ansað eftir at halda játtanir sínar.

Um dagarnar kom onnur frágreiðing, og hon er um einskiljingar.

Blaðið Vinnuvitan hevði ein úrdrátt úr hesum skjali í farnu viku, og tað var ikki hissini lestur.

Í hesi frágreiðing verður landsins stýrið latið úr hvørjum klodda í einskiljingarmálunum.

Og kortini valdar tøgn á tingi, og tað er at undrast yvir.

Men tøgn valdar um so mong onnur mál.

Fyri hálvum ári síðan stóð løgmaður okkara á odda fyri einari ólógligari sáttmálagerð mótvegis útlandinum, tá hann royndi prógvað okkurt frambrotið har.

Hann dumpaði við einum braki, tá hann breyt stýrisskipanarlógina.

Annað stórmálið mótvegis útlandinum er Hoyvíkssáttmálin, sum hevur ligið og ræsað á tingi nú í fimm mánaðir.

Men neyvan nøkur stjórn hevur nakrantíð fingið ein so skarpan gang frá sínum egna eftirliti, sum okkara landsstýri nú hevur fingið frá Landsgrannskoðanini.

Landsgrannskoðanin er ma. komin eftir,

at landsstýrið hevur hvørki orku ella førleika til at loysa einskiljingartilgongdina,
at eingin játtan er til keyp av serkønari hjálp,
at yvirskipaðar mannagongdir væntað,
at eingin rágevaratænasta er boðin út,
at landsstýrið lat fíggjarlógaruppskotið frá sær uttan at søkja um játtan til einskiljingarnar,
at landsstýrið fekk 1 mió. kr. til endamálið sum kostaði 15 mió.kr.,
oam.

Í fleiri førum tykist tað, sum um Landsstýrið og og einskiljingarnevndin ikki rættiliga hava vitað, hvat fyrifórst í fyritøkunum, sum skulu einskiljast, og hava tí ikki havt neyðugu vitanina at kunna um gongd og støðu í málunum, verður tikið til.

Meðan milliardir standa upp á spæl, stríðast samgongumenn fyri opnum tjaldi um, hvønn veg teir skulu venda sær sjálvum í hesum stóru málum.

Teir eru nú farnir at hoyggja runt við Atlantsflog, og skjótt koma aðrar fyritøkur undir raggaða knívin hjá teimum.

Úttalilsi teirra eru líka so barnslig og hjálparleys, sum øll viðgerðin aftanfyri.

Arvasilvurið verður søplað higar og hagar, og skattaborgarin situr sum Kánus.

Staðfest er enn eina ferð, at vit hava eitt stýrið, sum ikki sær fram um sína egnu nøs.

Tilvildin ræður, og eingin kós er sett fyri dagin í morgin.

Og alt fleiri føroyingar eru farnir at spyrja hvønnannan, hvat tað er, sum veruliga hendir her í hesum landi fyri tíðina.

Sig tína meining í Sosialinum

